Føroya Bjór Simultan

54 pør tóku hesaferð lut á árligu simultan-kappingini

BRIGDE
Bogi Simonsen

Tann árliga Føroya Bjór Simultan kappingin í Bridge varð aftur í ár sera væl móttikin av øllum bridgespælarum kring landi. Heili 54 pør luttóku og spælt var á hesum støðum, Tórshavn, Eysturoynni, Tvøroyri, Klaksvík og í vágunum. Kappingin er soleiðis gjørd, at øll spæla somu spøl kring landi og eftir at vinnarinir av teimum einkultu kappinginum eru funnir, verður alt síðani uppgjørt sum ein kapping og ein samlaður vinnari verður funnin.

Vinnarinir av teimum einkultu kappinginum kring landið gjørdust hesi:

Tórshavn: Bjarki Johannesen og Eliesar Olsen
Eysturoyggin: Magni Jøkladal og allan Dal- Christiansen
Tvøroyri: Hans Jacob Petersen og Arnbjørn Sivertsen & Hans Joensen og Jákup Hjaltalin
Klaksvík: Jens Jacobsen og Karl Isaksen
Vágarnar: Thomas Hans Gaardlykke og Jákup Egholm

Samlaðið vinnarin av Føroya Bjór Simultan 2004 gjørdist Allan Dal- Christiansen og Magni Jøkladal, teir vóru klárt tað fremsta parið.

Spæl

Her síggja vit Bjarka Johannesen in action.

	KB6 763 EB765 K7	
D54 KB842 K8 DBT		T32 E DT932 8654
	E987 DT95 4 E932	

N	E	S	V
		Pas	1
Pas	1ut	Pas	Pas
2	D	A.P	

Eg sat eystan við einum góðum fimm litið í og helt at vit ikki kundi fáa annað enn ein reinan topp. Eg byrjaði glaður við ess og skifti spentur til 6. Men akk, lítla løtu seinri hevði Bjarki, eftir at hava spælt tríggja fer og knípt eftur damuni, slutspælt meg uppá ein trumf, soleiðis at eg varð noyddur at spæla uppí hansara trumf gaffil og hann fekk 8 stikk og ein reinan topp.

Tillukku

Føroya Banki og Trygd ynskja Stjørnuni og STÍF hjartaliga tillukku við steypinum.

TRYGD
FØROYA BANKI

Samlaða støðan fyri landið

Par nr.	Navn	Stig
38	Magni Jøkladal - Allan Dal-Christiansen	958	1
43	Jens Jacobsen - Karl Isaksen	875	2
51	Jákup Hjaltalin - Hans í Líð	854	3
18	Arnbjørn Sivertsen - Hans Jacob Petersen	853	4
25	Thomas Hans Gaardlykke - Jákup Egholm	829	5
52	Oli Holm - Dia Poulsen	820	6
20	Asi Jacobsen - André	819	7
11	Kaj Alstrup - Ingi Helmsdal	791	8
29	Robert Langgård – Eyðun Anthoniussen	790	9
32	Dia Petersen - Haldor Ellingsgaard	790	9
30	Atli Hansen - Jógvan Ranghamar	785	11
4	Bjarki Johannesen - Eliesar Olsen	780	12
27	Verna Rasmussen - Josta Olsen	774	13
24	Sonni Nielsen - Súni	769	14
48	Jórun Højsted - Marita Krosstein	762	15
42	Hjørleif Fredriksen - Julius Hansen	759	16
3	Høgni Jacobsen - Finn Ougaard	758	17
1	Høgni Vesturklett - Gunnar Mouritsen	756	18
8	Salomon Johansen - Zakaris Joensen	755	19
41	Páll Sigmund Sørensen - Jógvan Clementsen	752	20
15	Andrias - Hanneba	745	21
16	Dan Erik Jóhansen - Poul F.	737	22
44	Sámal Júst - Steinbjørn Jacobsen	730	23
9	Bogi Simonsen - Símin Lassaberg	717	24
34	Leif Pedersen - Per Kruger	717	24
19	Áki Dimon - Edvard	707	26
39	Álvur Klakk - Randi Jacobsen	707	26
22	Else Heinesen - Jóannes Heinesen	696	28
2	Oddmar Danielsen - Henriette Svenstrup	691	29
40	Odd Fjalsbak - Hans Eliesar Fjallsbak	673	30
49	Jórun Winther - Tove Poulsen	672	31
5	Hannis Jacobsen - Peter Sigurd Rasmussen	671	32
53	Jóhan Petur - Petur Johs.	669	33
7	Jana Mikkelsen - Danny Danielsen	667	34
10	Laila Danielsen - Hedin Mortensen	667	34
35	Dia Jacobsen - Hilmar Jacobsen	666	36
28	Jóhann - Hans Daniel	664	37
50	Einar - Ingier	657	38
26	Ruborg - Gunnvør	652	39
14	Poul Johannes - Hanneman Müller	643	40
23	Arni - Jóan Hendrik	634	41
6	Eyðbjartur Danielsen - Hanus Bærentsen	631	42
17	Petur Gærdbo - Egil Steintórsson	629	43
47	Finn Jacobsen - Marjun Isaksen	612	44
31	John-Reid Skordalið - Jaspur Langgaard	609	45
37	Páll Hansen - Sigmund Dam	609	45
45	Katrin Rasmussen - Jutte Heinesen	608	47
21	Andrias - Anna Margit Ole Jacobsen	598	48
36	Hjalmar Joensen - Ola Jákup Olsen	557	49
46	Mogens Højsted - Finn Boje	542	50
12	Yvirsitari - Yvirsitari	540	51
54	Tórur Holm - Magni Augustinussen	540	51
33	Hallur Ellingsgaard - Eirikkur Joensen	539	53
13	Niclas Ludvig - Sámal Pauli Johannesen	531	54

StÍF-Søljan 20-24 (9-11):

Søljan nærkast

Bert eitt stig er nú á muni millum StÍF og Søljuna

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Útsetti dysturin millum StÍF og Søljuna varð leiktur á Skála sunnudagin. Í fyrstu atløgu varð dysturin av ongum, tá eingir dómarar møttu til dystin á Skála, men hesaferð bar betri til.

Ta ferðin duldu tær hjá Søljuni ikki fyri, at tær vóru vónbrotnar um, at dysturin varð av ongum, tí tær høvdu fyrireikað seg væl til uppgerðina, sum kundi lyfta tær á stigatalvuni, men fyrireikingarnar tóktust ikki vera minni góðar hesaferð.

Undir øllum umstøðum eydnaðist teimum at vinna sær tvey kærkomin stig til kontina, soleiðis at totalurin nú er fýra stig, og nú er bert eitt stig upp á fimta plássið, har StÍF í løtuni heldur til.

Tað var eisini alla tíðina Søljan, sum hevði leiðsluna í dystinum. Tær løgdu skjótt sjógv niður til StÍF, men eitt skifti í fyrra hálvleiki var tó um reppið, at alt kiksaði. Søljan fekk tá einki mál í einar tíggju minuttir, og StÍF kom eina lítla løtu upp á javnt, men so var eisini liðugt. Geistirnir skræddu seg alt fyri eitt leysar aftur, tá seinni hálvleikur byrjaði, og restina av tiðini megnaðu tær at halda fast.

Og so er spurningurin, hvørt tær eisini megna at toga seg enn longur upp á talvuna, ella um StÍF fer at toga seg longur frá. StÍF skal nevnliga royna seg móti Kyndli komandi vikuskifti, og tað er ein dystur, sum skal vinnast, um liðið ikki skal detta heilt niður móti botninum.

Dysturin í tølum

StÍF-Søljan 20-24 (9-11):
Málskjúttar
StÍF: Paula B. Høgnesen 5, Poula D. Olsen 5, Ann Mari Østerø 3, Milica Ergic 3, Sunfríð B. Jacobsen 2(1), Beinta Joensen 2
Søljan: Nicoleta Radu 9(2), Heidi Maria Akselsen 4, Jana Jacobsen 3, Fía Selma Nielsen 2, Petra Thomassen 2, Hertha Simonsen 2, Arnleyg Haraldsen 1, Irdi Mikkelsen 1
Brotskøst: StÍF 2, Søljan 2
Útvísingar: StÍF 5, Søljan 2
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen

1. deild kvinnur

		dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Stjørnan	4	3	0	1	409	326	83	17
2	VB	4	4	0	0	425	322	103	16
3	VÍF	4	2	0	2	407	342	65	13
4	Neistin	3	2	0	1	385	339	46	12
5	StÍF	3	0	0	3	334	396	-62	5
6	Søljan	3	1	0	2	286	367	-81	4
7	Kyndil	3	0	0	3	242	396	-154	1

Máltindurin

Simona Dziugyte	Neistin	129	(21)
Aukse Vysniaskaite	VB	117	(30)
Nicoleta Radu	Søljan	114	(22)
Ioana Rápa	VÍF	100	(25)
Katarina Stepanov	Stjørnan	88	(19)
Sóley Mikkelsen	VÍF	88	(20)
Daiva Tuomaite	VB	87	(15)
Gurið Mortensen	VB	79	(6)
Nikolina Eyðbjørnsdóttir	VÍF	77	
Irina Rodevici	VÍF	74	
Milica Ergic	StÍF	73	(8)
Annika Ljósstein	Stjørnan	73	(18)
Joan M. Djordjevic	Stjørnan	67	(24)
Heidi Maria Akselsen	Søljan	66	(4)
Lina Andriulyte	Neistin	60	

Góð byrjan

Fimm føroyingar taka lut í 100 ára jubileumskappingini hjá Arbejdernes Skakforening af 1904. Tvey umfør eru leikt og Heini Olsen, Flóvin Tór Næs og Heini Danielsen hava fulla úrtøku

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Í samband við, at Arbejdernes Skakforening af 1904, sum heldur til í Keypmannahavn, verður 100 ár, hevur felagið sett saman eina stóra opna jubileumskapping við yvir 100 luttakarum. Kappingin er í døgunum 7/2 - 15/2, og byrjaði sostatt leygardagin. Nýggju umfør skulu telvast.

Teir fimm føroyingarnir eru Flóvin Tór Næs, Heini Olsen, Heini Danielsen, Hjalmar Joensen (bróður Helga Joensen, Toftir) og Jónbert Jensen (fyrrverandi HT, nú limur í AS 04). Hans Kristian Simonsen og Eyðun Nolsøe høvdu teknað seg til kappingina, men báðir meldaðu avboð.

Nakrir stórmeistarar og altjóða meistarar luttaka, og møguligt er tí at vinna normar. Men lat okkum nú ikki leggja ov nógv "trýst" á landsmenn okkara. Ikki tí, eftir at Heini Olsen vann sær sín fyrsta IM-norm í seinastu viku, er ringt at lata vera við at hava sterkar vónir um fremstu telvarar okkara. Mentali múrurin er sanniliga fallin, og 2004 verður væntandi eitt ár við fleiri normum og harvið breiðari altjóða viðurkenning til Føroyar.

Olsen tryggastur

Tvey umfør í stórsligu kappingini eru í skrivandi løtu leikt. Heini Olsen hevur leikandi lætt vunnið bæði talvini móti lægri rataðum telvarum. Sjálvsálitið bilar einki!

Hinvegin høvdu Flóvin og Heini Danielsen trupulleikar í teirra seinna talvi. Flóvin vann uppá tíð móti tíðarneyðsnarkomananum Per Auchenberg, eftir at støðan hjá føroyinginum leingi var hættislig. Danielsen var somuleiðis undir trýsti, men bardi seg eins og Flóvin aftur í talvið. Jónbert Jensen (1245) og Hjalmar Joensen (1609) hava ávíkavist hálvt og 0 stig.

Í 3. umfari sleppur Heini Olsen rættiliga at royna seg; Hann hevur nevnliga svarta fólkið móti GM Eduardas Rozentalis (2625), ið hevur hægsta ratingtalið í kappingini.

1.deild - víðopið

Leygardagin verður seinasta umfar leikt í øllum deildunum og hjá unglingum. Allar deildirnar uttan 1. deild eru avgjørdar. Klaksvíkingar hava 25 stig, kollfirðingar 23,5 og havnarmenn 21,5 stig. Øll trý liðini kunnu tískil gerast føroyameistarar.

Serliga dysturin millum framstormandi havnarliðið og oddaliðið úr Klaksvík er áhugaverdur. Havnarmenn ætla sær ikki at styrkja liðið við t.d. útisetum, meðan vit hava frætt, at klaksvíkingar helst ætla sær styrk av flatlondum; Heini Olsen kann ikki koma til Føroyar komandi leygardagin vegna kappingina í Danmark. Næsti telvari á styrkilistanum hjá Klaksvíkar Talvfelag er útisetin Eyðun Nolsøe, men eingin endalig avgerð er tikin.

Kravið hjá havnarmonnum er 4-0 sigur. Úr Havnar Telvingarfelag verður sagt, at teir trúgva uppá kjansin, við ella uttan styrk til liðið hjá Klaksvíkar Talvfelag. Trúgv kann sum kunnugt flyta fjøll.

Kollfirðingar muga helst hava minst 3 stig í dystinum móti toftamonnum, fyri at kenna seg tryggar. Verður Jens Kristian Hansen við toftamonnum? Tað vóna klaksvíkingar og havnarmenn í øllum førum! Hans Kristian Simonsen verður tøkur hjá kollfirðingum eftir sítt avboð til kappingina í Danmark, meðan sera ivasamt er um sviin Tiger H. Persson nær at koma til Føroyar, tá hann eftir ætlan luttekur í aðrari kapping.

Endabrakið, har allar deildirnar verða savnaðar undir somu lon, verður í leygardagin 14. februar í Bygdarhúsinum í Hósvík. Byrjað verður stundisliga kl. 13.00.

Talvið hesa vikuna

Flóvin Tór Næs (2253) - Casper Olsen (1979)
AS04 Centenary Copenhagen (1. umf), 07.02.2004

1.Rif3 c5 2.c4 b6 3.e4 Bb7 4.Ric3 d6 5.d4 cxd4 6.Rixd4 Rif6 7.f3 g6 8.Be2 Bg7 9.Be3 Ribd7 10.0-0 0-0 11.Fd2 Rc8 12.Rac1 a6 (Eitt slag av Hedgehog uppstilling í Sisilionsku byrjanini) **13.Rfd1 Re8 14.b3 14...e6** (Svartur spælur uppá d5 gjøgnumbrot, og tá má hvítur vera væl fyrireikaður) 15.Bf1

Støðumynd eftir 15.Bf1

15...d5? (Ov tíðliga. Neyðugt er at fáa frúnna yvir á a8 áðrenn sentrumságangin) **16.exd5 exd5 17.Rixd5 Rixd5 18.cxd5 Bxd5 19.Bxa6** (Danin gloymdi afinnuna, tá hann leikti d5) **19...Rxc1 20.Fxc1 Fa8 21.Bb5 Rc8** (Svartur roynir sjálvsagt at halda fram, men Flóvin blakar ikki slíka støðu frá sær) **22.Fd2 Rif6 23.Bh6 Bxh6 24.Fxh6 Rie8 25.Fe3 Ric7 26.a4 Rixb5 27.Rixb5 Rb8? 28.Ric7** 1-0